## DAGSINS MEINING

# Brá úttalilsi

Tað gongur næstan ikki dagur, uttan vit hoyra politikarar ella embætisfólk brúka ósmæðin orð sum "fyri fyrstu ferð nakrantíð" og "ongantíð fyrr". Vit hava fingið faldarar og arbeiðsbólkar, ið hava orðað hetta og hatta. Er alt so vorðið framúrskarandi hjá landinum í dag? Riggar samfelagið betur í dag, enn tað gjørdi í 1990? Svarið sær tíverri út til at vera nei.

Almennu skipini kunnu eftir øllum at døma ikki fara í dokk uttan at eykajáttan og skipaleiga má til - hetta var ikki støðan fyrr. At skip skulu í dokk av og á kann neyvan koma óvart á nakran. Á almenna arbeiðsmarknaðinum er konflikt til nærum hvørjar samráðingar - hetta var ikki støðan fyrr. Verkføll hava verið av og á, men nú ber av. Deildir á sjúkrahúsinum stagnera - hetta var ikki støðan fyrr við undantak av ringastu kreppuárunum. Hvat er so hent tey seinastu árini, eftir at stórar uphæddir hava verið koyrdar í almennu umsitingina? Vit hava fingið eina stóra umsiting, ið tykist umsita minni og minni, eftirsum játtaninar til tey, ið reelt útinna almennu tænasturnar gerast meiri og meiri soltnar. Talan er í mangum førum um lækking, tá hugsað verður um inflatión. Harafturat kunnu vit nevna privatiseringsplanirnar hjá Fólkaflokkinum, ið fara at gera, at uppaftur minni verður hjá umsitingini at umsita.

Nógv kundi verið spart við at útdelegera heimildir til stovnarnar og ikki bara ábyrgd. So hevði miðfyrisitingin verið minni í vavi og bíligari, og peningur kundi verið brúktur uppá at útføra almennu tænasturnar.

Ótaktisk úttalilsi kosta hesum samfelagi sera nógv. Karsten Hansen hevur átt nøkur av hesum úttalilsum gjøgnum tíðina. Ógvuliga ótaktiskt má tað eisini sigast at vera, tá umboð fyri sjúkrahúsleiðsluna úttala seg tvørt í móti sjúkrasystrunum, ið hava sagt upp. Tað er at niðurgera fólk við at siga, at tey tvætla. Tað er óheppið, um fólk eru ov kvik at úttala seg alment, tó at tað skal vera opinleiki og ein almennur dialogur um týðandi samfelagslig viðurskifti. Gott hevði verið, um fulltrúar, leiðslustarvsfólk og onnur lærdu at arbeiða eftir meginreglini: tonkti tankin kann altíð sigast, men sagda orðið kann aldrin tigast!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Merkið í New York - men hentleikaflagg í Føroyum

**Tað er Tjóðveldispolitikkur anno 2001, men nú er føroya fólk farið at troyttast og krevur broytingar**

**Eyðólv Dimon**



Tað mundi taka mongum fyri hjartað at hoyra formann Tjóðveldisfloksins í valstríðnum ferð eftir ferð siga, at føroyska samfelagið hevði ongantíð verið so gott at liva í, sum nú, ið samgongan hevði tikið triðing av blokkinum frá føroyska heilsu-, almanna- og skúlaverkinum. Hetta var orðalagið, og einum rennur til hugs orðini "at jú oftari ein endurtekur eina lygn …" Tá samgongulimir verða kroystir, so samanbera teir játtaninar frá kreppuárunum í 90'unum við játtanir í dag, og gera niðurstøðuna, at nú er játtanin hægri, og tí hevur føroyska samfelagið tað ongantíð so gott sum júst nú.

Hví siga sjúkrarsystrarnar upp á Landssjúkrahúsinum?

Hví verða deildir á Landssjúkrahúsinum stongdar fleiri mánaðir hvørt ár?

Hvat við teimum 150 akuttu røktarheimsplássunum, sum tørvur er á?

Hví siga leiðslurnar í fólkaskúlunum, at játtanin forðar teimum at halda fólkaskúlalógina?

Hví verður bert játtaður ein triðjingur av teimum tímunum, sum søkt verður um til næmingar við serligum tørvi?

Hví er eftirútbúgvingin av fólkaskúlalærarum tikin burtur ár 2001? og soleiðis kundi verði hildið fram.

**Betri Fólkaskúli betrar kappingarføri**

Ì øðrum londum, sum vit helst vilja samanbera okkum við, hava tey langt síðan lagt til merkis, hvussu umráðandi tað er fyri t.d. kappingarførið, at fólkaskúlin fær bestu kor at virka undir. Í Danmark stendur arbeiðsgevarafelagið á odda, í orðaskiftinum um at fáa Fólkaskúlanum hægri játtan, við júst betran av kappingarførinum í huga. Føroyska arbeiðsgevarafelagið er tíverri ikki komi longri enn at halda, at kappingarføri er at fáa lækka lønirnar hjá løntakarunum.

**Dubbing at møta oljusamfelagnum.**

Nú tað tykist sum hol er sett á orðaskifti um árini av einari føroyskari oljuvinnu, man standa øllum greitt, hvussu neyðugt tað er í dubbingini hjá okkum, at vit styrkja fólkaskúlan. Tjóðveldisflokkurin vil hava ein føroyskan fólkaskúla, men snýr orðaskifti seg um játtan, dygd ella innihald, tá verður Panamaflagg drigið í húnarhátt. Merkið á stong í New York, men hentleikaflagg á stong í Føroyum. Hetta er Tjóðveldispolitikkur anno 2001.

**Sjónleikurin ein fiasko**

Føroyska fólkið hevur vent hesum politikki baki, og á komandi løgtingsvalið krevur veljarin broytingar. Ein kendur maður segði einaferð "Gev fólkinum sjónleik …" Og tað hava føroyingar so dyggiliga fingið hesi knapt 4 árini, men nú er meirilutin farin at troyttast.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri maður, faðir, verfaðir og abbi

**Árni Olsen**
**fyrrverandi yvirlækni**

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 7. desember, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst í útvarpinum.

*Familjunnar vegna*
**Elisabeth og synirnir**

---

## Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt vístu okkum samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Niels Pauli Sigurheim**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til Sandvíkar kirkju. Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu. Takk fyri hjálp til ervið. Ein serstøk tøkk til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, fyri góða røkt, gott hjartalag og stóra umsorgan.

*Fyri okkum avvarðandi*
**Niclas og Kári**

---

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Árni Dahl steinar í glashúsi

**Fríu Føroyar fírdu ikki fyri at spilla deyð fólk út**

**Heri Eysturlíð**
*Stockholm*



Mangt man vera føroyingum í holdið borið, men ikki júst dirvi. Tí er fyri neyðini, at onkur torir at tríva í pennin og tala at tí, ið hann heldur vera órætt. Í prinsippinum er tað púra beint, tá ið bløðini nú fáa av at vita frá Árna Dahl.

Men bara í prinsippinum. Tí spurningurin er, um fyrrverandi útgevarin av Fríu Føroyum er tann rætti at gera seg klókan upp á sømiliga blaðskriving og pressuetikk. Illa hevur hann rannsakað seg sjálvan, og hvat skulu vit siga um sjálvkritikkin?

Her hugsi eg ikki bara um, at Fríu Føroyar líka frá fyrsta degi vóru ein samanhangandi lovsongur til nøkur av teim ringastu ræðuveldunum, ið heimurin hevur sæð. Føroyingar hava lætt við at fyrigeva politiskum naiviteti og dárskapi, og fáur man taka Árnasa politiska virksemi í áttatiárunum serliga tungt.

Men tað var ikki bara politiskur dárskapur, ið eyðkendi hetta korkareyða blað. Fríu Føroyar vóru sanniliga "slóðbrótandi" á øðrum økjum, ikki minst tá ið tað ráddi um at spilla fólk út. Og ikki bara tey, ið vóru á lívi. Tá ið Dan Klein í eini viðmerking í Dimmalætting nevnir eina bók hjá Marionnu Dahl, ið er ógvisligur lesnaður sjálvt fyri hann, sigi eg sum fransmenn: Dejá vu.

Hatta hevur Marianna roynt fyrr. Í Fríu Føroyum.

**Spilti deyðan mann út**

Í Oktobur mánaði 1987 prentaðu Fríu Føroyar eina friðarrøðu, ið Marianna Dahl hevði hildið í Skinskatteberg í Svøríki. Enn tann dag í dag minnist eg brot burtur úr røðuni, tí ungur sum eg var, hevði eg aldrin sæð nakað líknandi á prenti áður:

"Í dag veittra fløggini á hálvari stong heima í Føroyum. Tí í dag fer ein av teim gomlu politikarunum til gravar. Hann varð 79 ár. Innetin afturhaldskroppur alla sína tíð. Hann kundi fyrr á døgum, tá hann hevði fingið eitt sindur upp í høvdið, og tárini funnu veg fram úr eygnakrókunum, halda kenslubornar røður um føðilandið…".

Síðani kemur eitt brot, sum eg ikki minnist orðarætt, um hvussu hesin gamli politikarin hevði svikið landið, og seinni í røðuni:

"Í dag er fyrsti vetrardagur. Kalt verður hjá teimum, ið fylgja tí gamla politikaranum til gravar. Hesir gomlu afturhaldskropparnir doyggja jú fyrr ella seinni…".

Hesi brot havi eg endurgivið úr minninum, og tí tað ikki heilt orðarætt. Men innihaldið er tað sama, og lesarin kann sjálvur leita sær røðuna fram í Fríu Føroyum ella kanska spyrja hjúnini Dahl nærri um orðingina.

Tann gamli politikarin, ið sipað verður til, var Hákun Djurhuus, fyrrverandi løgmaður og floksformaður.

**Politikarar eru í serstøðu**

Gaman í var Hákun Djurhuus ikki hvør sum helst og eigur sjálvsagt at verða granskaður av eftirtíðini. Og fert tú upp í politikk, mást tú rokna við, at tú eventuelt verður viðgjørdur og vigaður, eisini eftir at tú ert farin av foldum. Vit kunnu ikki leggja lok á søguna og politisk tíðarskeið, so hvørt sum politikarar fella frá. Eyðvitað hava markantir politikarar sum Hákun Djurhuus bæði vinir og fíggindar, og soleiðis eigur at vera.

Men kortini! Gamalt var at lata fólk sleppa at kølna í grøvini, sjálvt politikarar. Tað var ikki gamalt at fara í bløðini at spilla fólk út, sum lógu undir børu. Undantak frá hesi reglu eru bølmenni úti í stóru verð sum t.d. Kim Il-Sung, men í Føroyum hevur virðingin fyri teim deyðu aloftast verið stór.

Og tað var so slett ikki gamalt at reka spott á líkfylgi, serliga ikki í so lítlum samfelagi sum tí føroyska.

Hetta tabu brutu Fríu Føroyar so ruddiliga í oktobur 1987. Orsøkin er púra greið: politiskt stóð Hákun Djurhuus sera langt frá Fríu Føroyum og var helst stats- og fólkafíggindi í teirra eygum. Ein av høvuðsideologiunum hjá flestum kommunistiskum sektum og trúarbólkum var jú nettupp, at øðrvísi hugsandi høvdu einki sum helst menniskjavirði. Fyri hasum slagnum var vanligur fólkaskikkur oftast tað reina volapykk, fyri ikki at siga fasisma og statsfíggindaligt virksemi.

Hvat Marianna hevur hug at siga og skriva fyri almenninginum, kunnu vit sjálvandi ikki lasta Árni Dahl fyri. Men tað skerst ikki burtur, at Árni var ein teirra, ið gav Fríu Føroyar út, og tí kundi hann saktans sligið nevan í borðið ta ferðina og forðað fyri, at ein nýliga deyður og avvarðandi vórðu hongd út í blaðnum hjá sær. Men tað hevur Árni eftir øllum at døma ikki gjørt. Politisk sannføring ella okkurt annað?

**Nú, 14 ár seinni**

Veit ikki, hvussu Árni Dahl hevur tað við tí kommunistisku hugsjónini og síni politisku og redaktionellu fortíð í dag. Veit ikki, um hann framvegis heldur hesa niðurgering av einum deyðum manni og einum líkfylgi vera í fínasta lagi, og um hann ongan sum helst mótsetning sær ímillum hetta og at hann nú er farin at sláa seg fyri bringuna sum ein sømuleikans verndareingil. Veit ikki, um Árni Dahl heldur, at munur er á fólki og fólki, alt eftir politiskari hugsjón. Veit ikki, um Árni Dahl heldur, at 14 ár eru „so langt síðani", og at hatta brotið í Fríu Føroyum tískil ikki hevur stórvegis upp á seg í dag.

Ein, ið ikki er líka skúlaður í teirri kommunstisku læruni og hugsunnarháttinum sum Árni Dahl, hevur hug at siga sum svenskarar: at moralur er góður, men dupultmoralur er dupult so góður. So um Árni skal hava nakað sum helst trúvirði millum manna, noyðist hann til skriftamáls fyri almenninginum. Tíðin lekir ikki øll sár, og allir føroyingar eru ikki so stuttmintir, sum onkur tykist halda.

---

# Ikki eiti á lurtaratænasta

**Thomas Arabo**



Tað var nú einaferð væntandi, at aftaná Tjóðveldisumboð kom niður á Fólkating, so fór ikki at verða friður eina løtu í tíðindunum um sjálvsavgerðargrætt, viðurkenning sum tjóð, og hvat loysing annars verður rópt í hesum døgum. Ikki nokk við, at endurgivið verður frá hesum. Nú er Útvarp Føroya eisini so beinasamt, at lurtarin sleppur frá at taka støðu til, um eitt mál er týdningarmikið ella ikki. Vit fingu at vita í útvarpinum fyrrakvøldið, at Anders Fogh Rasmussen svaraði ikki uppá **týdningarmikla** spurningin um sjálvsavgerðarrættin. Við øðrum orðum er ikki nokk, at man í fjølmiðlunum og aðrastaðni, hevur gjørt eina sjálvfylgju til ein spurning – man hevur enntá gjørt tað til ein **týdningarmiklan** spurning.

Sjálvsavgerðarætt hava vit til eina og hvørja tíð. Vit hava sjálvir avgjørt, at vit ikki ynskja loysingina. At sjálvsavgerðarættur er eitt eingangsfyribrigdi, ið bert kann brennast av einaferð med alla, hevur ikki hald í veruleikanum. Um hettar var tilfeldið, so hava Grønlendingar brent hann av, tá teir góvu seg undir donsku grundlógina. Soleiðis hongur tað sjálvsagt ikki saman, og kunnu vit nýta okkara sjálvsavgerðarætt til økt sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum. Ynskir fólkið so seinni loysing, ja so tryggjar ómissandi sjálvsavgerðarrætturin, at vit til ta tíð kunnnu loysa, um vit hava hug. Hvat er problemið? Har er einki problem, men tjóðveldismenn royna tað mannminkandi, at biða danir um at viðurkenna nakað, sum teir yvirhøvur einki skulu hava at siga um. Sjálvsavgerðarrætturin er tað bert nýggja ættarliðið í Tjóðveldisflokkinum, ið ivast í.

Hóast eg ikki taki undir við fullveldisætlanini, so trúgvi eg uppá økt sjálvstýri, men einasti máti er at arbeiða fram ímóti praktiskum loysnum, ið kunnu samla fólk, heldur enn at leita við ljós og lykt eftir orðadefinitiónum at diskutera og problematisera. Eg havi bara góðar royndir av at arbeiða politiskt saman við Tjóðveldisflokkinum, men flokkurin sær tíverri út til at verða broyttur, nú yngra ættarliðið hevur tikið við. Eg minnist, tá Tjóðveldisflokkurin plagdi at hava fimm loysnir til hvørt problem, nú hava teir fimm problem til hvørja loysn.

---

# Nakað um politiska rákið – eitt nú í Vágum

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*
*Fólkafloksins*



Sum eg nevndi í Dagblaðnum og í Norðlýsinum fegnist eg um – hóast Fólkaflokkurin misti mannin á danatingi – at Fólkaflokkurin stóð sterkur í Klaksvík og Norðoyggjum, og vit gjørdust aftur størsti flokkur.

Men givið er, at leiðslan í Fólkaflokkinum hevur fingið nakað meira at hugsa um, og her eru viðurskifti, vit fara at tosa nærri um.

Tað er altíð veljarin, sum í síðsta enda avger valúrslitið, hann hevur rættin, men satt at siga, undrist eg á valúrslitið í Vágum.

Politiska rákið verður ofta vent av mongum ymiskum og kanska løgnum hugsanum.

**Eingin framgongd uttan broytingar**

Føroyar – eins og londini uttan um okkum – standa í løtuni fyri stórum broytingum, tað verið seg vinnuliga, innan samskifti og ferðslu og ikki minst ríkisrættarliga. Tað kann tykjast torført at fylgja skjóta útviklinginum, nú ein partur av vinnu okkara helst verður innan oljuvinnu og avleiðingum av henni og at allur stuðul til fiskivinnuna er horvin, við einum betri úrsliti.

Fólkaflokkurin í Vágum hevur seinastu árini átt umboðið, sum fyrst gjørdist formaður í fíggjarnevndini og síðani landsstýrismaður í fiskivinnumálum, nevniliga Jørgen Niclasen, Jóanis Nielsen hevur umboðað Vágarnar á tingi.

Hesir báðir hava verið eldsálir fyri framburði, hvør á sínum øki. Teirra partur í tænastuni fyri Vágunum hevur verið tiltikin, givið verulig úrslit og kann koma at geva Vágunum nógv meira.

**Skapa stóran framburð í Vágum**

Við teimum hava vit fingið gongd á Vágatunnilin, meðan bæði Finnbogi Arge og Bjarni Djurholm hava sitið sum landsstýrismenn, Gásadalsbergholið varð sett á eftir dugnaligum arbeiði frá báðum vágatingmonnunum. Jørgen Niclasen hevur við einum samdum Fólkaflokki fingið Skipaeftirlitið flutt í Vágar.

Soleiðis kemur øll Vágoyggin upp í hin partin av Føroyum, samstundis sum partar av almennu umsitingini koma at gera sítt til at breiðka samfelagið í Vágum.

Eg havi spurt meg sjálvan, hvør orsøkin er til, at Vágarnar ikki tóku betur undir við Fólkaflokkinum til fólkatingsvalið!

Eru vágafólk rædd fyri broytingunum, sum henda í landi okkara vinnuliga ella ríkisrættarliga!

**Latið okkum ikki verða afturútsigld, tí vit ræddust broytingar**

Fólkaflokkurin virkar fyri broytingum, ið virka framburð í landi okkara, broytingum, ið ikki ganga skjótari enn vit búskaparliga tola.